# BILAR

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800




*Chevrolet Cruze verður royndarkoyrdur saman við Heðini Weihe frá Auto Service*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Bilradio hósdagin kl. 16.05: RÁS ...títt radio

# Cruze royndar-koyrdur

Í sendingini Bilradio á Rás2 hósdagin er samrøða við Eirik Ó. Simonsen deildarleiðara á bildeildini á Tekniska Skúla, í sambandi við at skúlin fyllir 75 ár. Eirikur hevur arbeitt sum lærari á skúlanum í yvir 30 ár.

Samrøða er við Fríðrik Bláhamar frá First Stop, um týdningin av at koyra við røttum dekkum, og við Niclas Persson og Anders um Triumph motorsúkklurnar, sum MC-Sølan nú umboðar.

Eisini verður ein Chevrolet Cruze royndarkoyrdur saman við Heðini Weihe sølumanni hjá Auto Service.

**mg**

# Airbag í trygdarbeltinum



*Ford Explorer árgang 2010 verður fyrsti bilur við innbygdum airbagtrygdarbeltum*

Í 2010 koma Ford á marknaðin við tí fyrsta trygdarbeltinum, sum kann blásast upp við innbygdum airbag. Trygdarbeltini eru serliga gjørd fyri at betra um trygdina hjá teimum, sum sita á baksetrinum. Talan er um skaðar á yvirkroppin sum t.d. høvdið og hálsin.

Fyrsti bilur við airbag trygdarbelti til tey ferðandi á baksetrinum verður nýggjasti Ford Explorer, sum kemur á marknaðin í 2010. Eftir tað er ætlanin at hesi trygdarbelti verða standard útgerð í øllum nýggjum Ford bilum.

**mg**



*Ford Inflatable Safety Belts*